# Reglugerð um vatnveiting í Tórshavnar kommunu

Við heimild í lóg nr. 48 frá 24. mars 1899 om Tilvejebringelse af Vedtægt for Benyttelsen af Vand fra Tórshavns Vandværk hevur Føroya Landsstýri staðfest soljóðandi av Tórshavnar kommunu tann 24. juni 1999 samtyktu reglugerð um brúk av vatni frá Tórshavnar Vatnverki:

Øki

§ 1

Henda reglugerð er galdandi í Tórshavnar kommunu.
Hesar fyriskipanir galda fyri allar vatninnleggingar í húsaognum, útstykkingum o.ø. frá tí, tær eru íbundnar veitingarleiðing í gøtu ella vegi, eisini fyri broyting í verandi vatninnlegging ella víðkan hennara.

Allýsingar

§ 2

Við vatnveiting í hesi reglugerð er at skilja savningarøki í haga til drekkivatn, byrgingar, rávatnsleiðingar, reinsiverk, pumpustøðir, trýstminkingarstøðir, goymslubrunnar, ventilar, høvuðsvatnleiðingar og stikkleiðingar.
Høvuðsvatnleiðing er leiðing frá vatngoymslum og til hús.
Við stikkleiðing er at skilja ta vatnleiðing, ið er frá høvuðsleiðing í gongubreyt ella vegi og inn á ogn húseigarans. Vanliga endar stikkleiðing við einum ventili, o.u. 0,5 m innan fyri mark.
Tann partur av vatnleiðingini, sum liggur í ogn húseigarans er ogn og undir ábyrgd hansara, meðan tann partur, sum liggur uttanfyri ognina, er ogn og undir ábyrgd vatnverksins.

Eftirlit

§ 3

Vatnverkið skal ansa eftir, at arbeiðið verður gjørt sum ætlað, smbrt. loyvi og tekningum. Er arbeiðið ikki gjørt samsvarandi, kann vatnverkið krevja tað broytt.
Við eftirliti sínum tekur vatnverkið onga ábyrgd av, hvussu verður gjørt, ei heldur av tilfarsbroti.
Kommunan hevur rætt til at kanna allar vatnleiðingar, sum eru íbundnar kommunala vatnkervið.
Eingin vatnleiðing má tyrvast, fyrrenn hon er skoðað og góðkend av vatnmeistaranum.
Trýstroyndir skulu fara fram, meðan vatnmeistarin er hjástaddur. Vatnmeistarin kann krevja trýstroynd fyri hvørjar 100 m við 1,5 ferðir vanligt trýst á staðnum, og má trýstið í 5 minuttir í mesta lagi falla við 10%.
Liggur ein partur av stikkleiðingini í ogn grannans, hevur vatnmeistarin loyvi at kanna og bøta um hesar leiðingar, tá ið neyðugt er, tó ikki uttan fyrst at boða eigaranum av ognini frá, og við teimum treytum, at økið ikki misprýðist, og at tað sær út sum áður, tá ið arbeiðið er liðugt.
Um høvuðsvatnleiðing liggur í privatari ogn, skal rætturin til at kanna og umvæla slíka leiðing, váttast við eini deklaratión, ið skal tinglesast á ognina.
Er brek/leki á privatari vatnleiðing, skal eigarin fáa brekið umvælt skjótast gjørligt. Er brek á vatnleiðing uttanfyri privata leiðing, skal vatnverkið fáa boð skjótast gjørligt.

Arbeiði við vatnleiðingum, bæði umvælingar, nýgerðir, broytingar og uppískoyti í verandi leiðing, kann bert verða gjørt av fólki við neyðugum førleika.

## Ognarskifti

§ 4

Tá ognarskifti fer fram, tekur nýggjur eigari við øllum áður galdandi skyldum, og hevur hin fyrri eigarin skyldu at gera nýggjum eigara vart við tær treytir sum eru fyri vatnleiðing. smb. hesi reglugerð.

## Broytingar

§ 5

Verður heitt á kommununa um at skifta stikkleiðing orsakað av leka ella rusti, skiftir vatnverkið stikkleiðingina frá høvuðsleiðingi og inn um mark ella á slíkan hátt, ið vatnverkið metir er skilabest.

Broytingar á stikkleiðing innan fyri mark skal eigarin gjalda.

Broytingar á stikkleiðing frá høvuðsvatnleiðing til stoppikrana 0,5 m frá marki rindar kommunan fyri.

Ger borgari broytingar á ogn síni t.d. um- ella uppíbyggingar, kann vatnverkið krevja, at stikkleiðingin verður umløgd fyri rokning eigarans.

Vatnleiðing í almennum øki, sum ikki meira er í brúki, skal takast burtur úr íbinding fyri rokning kommununnar.

## Vatnmálarar/Gjald

§ 6

Øll ídnaðarvirki, stovnar og størri fyritøkur skulu hava vatnmálarar á vatninnføringum, so alt nýtsluvatn kann verða skrásett.

Vatnverkið kann krevja, at onnur enn tey í stk. 1 nevndu hava vatnmálarar, um mett verður, at tað er neyðugt.

Vatnmálarin skal vera av góðkendum slagi, og vatnverkið skal hava høvi at avlesa hann.

Eigarin av ognini rindar fyri vatnmálaran.

Møguligt gjald fyri vatn verður ásett av Tórshavnar býráð og ognarar/brúkarar hava skyldu at lata kommununi tær upplýsingar, ið hava týdning fyri ásetan av gjaldinum.

## Íbindingar

§ 7

Sethús, stovnar og ídnaðarvirkir sum lúka galdandi treytir fyri vatníbinding, hava rætt til at fáa stikkleiðing íbundnan høvuðsvatnleiðing og við einum vatntrýsti ikki minni enn tvey bar. Er trýstið ov høgt má ognarin/brúkarin sjálvur fáa hetta í rættlag.

Er ynski um íbinding til t.d. neyst, seyðahús og onnur úthús, skal serligt loyvi fáast frá vatnverkinum.

Vatnleiðing skal íbindast og leggjast av fakfólki og má ikki byrja, fyrr enn umsókn um íbinding er játtað og íbindingargjald er goldið. Íbindingargjaldið verður ásett av kommununi.

Er frástøðan til høvuðsvatnleiðing órímiliga long, skal vatnverkið taka støðu í hesum máli.

Bert ein stikkleiðing verður løgd inn á hvørja ogn.

Er ynski um serliga brunatrygd, t.d. sprinkling av bygningum v.m., ber umsøkjarin sjálvur kostnaðin av arbeiðinum at knýta í hóskandi høvuðsvatnleiðing.

## Tilfar til leiðingar o.a.

§ 8

Allar uttandura vatnleiðingar skulu vera úr polyethylen DS. 2119 - ISO 161.1988, stytt PEM - PEH - PE 100, og skulu tola eitt trýst uppá minst 10 bar.
Høvuðsleiðingar skulu leggjast í minsta lagi 60 cm og stikkleiðingar í minsta lagi 30 cm undir jørð í tøttum tilfari, t.d. sum mold ella sandi.
Er á annan hátt vandi fyri frosti, skal fyribyrgjast við bjálving.
Vídd á stikkleiðing til vanlig sethús er Ø 25 mm. Eru ivamál í hesum sambandi, verða tey loyst í samráð við vatnverkið.

## Ventilar og stoppikranar

§ 9

Stoppikranin á stikkleiðing verður vanliga settur 0,5 m innan fyri mark og 3 m frá grannamarki. Er annað ynski, verður tað gjørt í samráð við vatnverkið.
Tað áliggur eigaranum av ognini at seta hóskandi ventildeksil yvir allar uttandura stoppikranar, og skal altíð verða møguleiki at sleppa til at skrúva stoppikranan fyri.
Ventilar og stoppikranar skulu eins og onnur vatnleiðing tryggjast ímóti frosti.
Vatnverkið skal verða kunnað, verður stoppikranin fluttur ella broytingar gjørdar á stikkleiðingina.

## Brandpostar

§ 10

Brandpostar verða uppsettir í samráð við Tórshavnar Sløkkilið.
Fjarstøðan millum postarnar er vanliga 200 m og skal slag og typa góðkennast av sløkkiliðinum.

## Vatnspilla

§ 11

Øll vatnspilla er bannað og bannað er at lata óviðkomandi vatn og at lata vatn renna óneyðugt. Sama er galdandi viðvíkjandi húsdjórahaldi.
Eisini er bannað at nýta vatn til køling av tekniskum installatiónum v.m. uttan skrivligt loyvi frá vatnverkinum.
Ídnaðarvirki og onnur virki, ið vanliga nýta nógv vatn, skulu á allan hátt skipa so fyri, at vatnnýtslan er ikki størri enn neyðug. Verða m.a. spulislangur nýttar, skal strálitútur/ventilur verða settur á.
Vatnverkið kann lýsa við avmarking í vatnnýtsluni.

## Brot

§ 12

Brot á ásetingarnar í § 11 verða at viðgera sum almenn politimál.
Verður brot annars gjørt á hesa reglugerð, hevur vatnverkið rætt til at skrúva fyri vatninum, um tað gerst neyðugt.

## Jørðsamband til el-installatiónina

§ 13

Tá stikk- og innføringsleiðingar úr jarni verða útskiftar við plastleiðingar, hevur vatnverkið, har tað er neyðugt, skyldu at lata nýggjan jørðkaðal. Ánarin av ognini skal sjálvur binda í jøðkaðalin.